# ítróttur

Nr. 158 • fríggjadagur • 22. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

| 1. deild menn | | dómari |
|---|---|---|
| 24.08 | B36-Skála | Lassin Isaksen |
| 24.08 | VB-NSÍ | Oddmar Andreasen |
| 24.08 | GÍ-HB | Birgir Sondum |
| 24.08 | B68-KÍ | Dagfinn Olsen |
| 24.08 | EB/S-FSV | Petur Skarðenni |

| 2. deild menn | | dómari |
|---|---|---|
| 23.08 | B71-ÍF | Tummas P. Olsen |
| 23.08 | B36-VB | Rúni Gaardbo |
| 23.08 | B68-KÍ | Hans F. Hansen |
| 23.08 | Sumba-TB | Oddmar Andreasen |
| 23.08 | LÍF-AB | Petur H. Joensen |

| 3. deild menn | | dómari |
|---|---|---|
| 24.08 | B36-Skála | Ólavur Larsen |
| 24.08 | Royn-NSÍ | Frits Poulsen |
| 24.08 | GÍ-HB | Jónleif Gerðisá |
| 24.08 | ÍF-TB | Ove Heinesen |
| 24.08 | EB/S-FSV | Jóannes Mikkelsen |

| 1. deild kvinnur | | dómari |
|---|---|---|
| 24.08 | EB/S-B36 | Jan á Líðarenda |
| 24.08 | Sumba-GÍ | Eyðun Kjærbo |
| 24.08 | HB-B68 | Janus Petersen |

GÍ-HB:

# Nýggj verja í Gøtu

**Burtursæð frá Andrew av Fløtum er alt fólkið tókt hjá meistarunum og oddaliðnum, sum higartil í ár hevur havt tað trupult ímóti GÍ**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Í fjør var tað júst í Gøtu, at HB av álvara setti ferð móti gullinum, og í høvuðsstaðnum eru vónirnar sjálvandi, at hetta kann endurtakast sunnudagin*

Um støðutalvan verður nýtt sum metingargrundarlag, so er eingin ivi um, at HB er stórfavorittur, tá ið teir í morgin fara til Gøtu. Men úrslitini í innanhýsis uppgerðunum millum GÍ og HB fyrr í summar hava verið gøtumonnum til fyrimunar. Í bólkaumfarinum í steypakappingini vann GÍ báðu ferðirnar við einum máli, og í báðum førunum skoraðu teir sigursmálið í síðstu løtu. Í landskappingardystinum í Gundadali var úrslitið 2–2, og ta ferðina javnaði GÍ í yvirtíðini.

Gøtumenn eru rættuliga nógv skerdir hesa ferð. Verjuspælararnir Bartal Eliasen og Leivur Hansen, sum báðir eru millum stuðulsspælararnar, hava fingið ov nógv kort og eru leikbannaðir. Bæði Janik og Popczynski eru so mikið skaddir, at tað er ivasamt, um teir verða førir fyri at spæla.

Tað hevur ljóðað í Havnini, at bæði Sámal Joensen og Magni Jarnskor, sum ikki hava verið við í ár, skulu hava vant dúgliga seinastu tíðina, men tað verður avsannað í Gøtu.

– Hatta man vera tað, sum vit plagdu at kalla konditttaríprát, og hóast konditttaríið ikki er opið, so velja vit at kalla hasi tíðindini soleiðis. Magni hevur fyri stuttum verið skurðviðgjørdur, og Sámal hevur helst ongantíð vant saman við besta liðnum í ár, verður sagt úr Gøtu.

Tá ið vit frættu, var ikki gjørt av, hvørjir skuldu loysa royndu og leikbannaðu menninar í verjuni av, men tað vera ivaleyst ungir spælarar. Mánakvøldið spældi GÍ venjingardyst á heimavølli ímóti NSÍ, sum vann 3–2. Málini hjá GÍ gjørdu Bárður á Lakjuni og Símun Samuelsen.

Einasti GÍ spælarin, sum í vikuni hevur verið burturi frá í landsliðsørindum, er Súni Olsen.

### Nógvir um boðið

Í HB er tað bara landsliðsmaðurn Andrew av Fløtum, sum ikki er tøkur. Hann er leikbannaður. Tá ið HB var á Skála bar tað ikki Janusi M. Joensen til at vera við. Hann er tøkur aftur, og tað kann gott vera, at einasta manningarliga broytingin verður, at hann verður settur á vinstra vongverja, og at Hallur Danielsen, sum seinast var í tí plássinum verður settur á miðvøllin í 4–4–2 spælskipan og ikki 4–3–3, sum HB annars hevur spælt, men hetta var ikki greitt, tá ið vit frættu.

Aðrir møguleikar eru, at onkur av ungu monnunum, sum hava verið við í ár, fær møguleikan. Her verður hugsað eitt nú um Bjarna Jørgensen, Rók Jespersen og Páll M. Joensen.

Tríggir HB spælarar hava í vikuni verið upptiknir av landsliðdysti. Umframt málskjúttan Rógva Jacobsen er talan um Andrew av Fløtum og Tór–Ingar Akselsen, sum var á beinkinum alla tíðina.

# Nógv stendur á

Tað leikar vanliga sera javnt á, tá HB er í Gøtu og tá KÍ er á Toftum. Júst hesir báðir dystirnir tykjast sunnudagin vera teir, sum hava størst týdning í oddastríðnum, og so er spurningurin, hvør av pørtunum megnar at toga hagtølini til sín fyrimun.

Á talvuni niðanfyri sæst, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi uppgerðunum seinastu 10 kappingarárini.

| | '02 | '01 | '00 | '99 | '98 | '97 | '96 | '95 | '94 | '93 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-Skála | 6-0 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 6-0 |
| VB-NSÍ | 0-0 | 5-0 | 3-1 | 2-0 | 0-5 | 3-0 | - | 1-3 | - | - | 4-1-2 | 14-9 |
| GÍ-HB | 3-4 | 3-2 | 1-2 | 1-2 | 1-3 | 1-1 | 5-1 | 2-1 | 4-1 | 0-0 | 4-2-4 | 21-17 |
| EB/S-FSV | - | 3-2 | - | - | - | - | - | - | - | - | 1-0-0 | 3-2 |
| B68-KÍ | 2-0 | 4-0 | 6-1 | 2-3 | 1-5 | 1-2 | 0-4 | 2-1 | 3-0 | 0-3 | 5-0-5 | 21-19 |



B68-KÍ:

# B68 miðjar eftir Europa

**99 ára føðingardagsbarnið KÍ skal næstu lítlu vikuna spæla tvær ferðir á Svangaskarði – fyrst útidyst og síðani á heimavølli**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Hjá B68 hava seinstu vikurnar verið stak hugaligar, og nú er vónin, at liðið skal lyfta seg enn meira*

Í dag skipar KÍ fyri 99 ára føðingardagshaldi í Klaksvík. Í morgin er sjálvur føðingardagurin. Tá fer KÍ út á Svangaskarð, og teir plaga altíð at hava ikki so fáment áskoðaralið við sær. Higartil í ár hava áskoðararnir verið eitt sindur ótryggir. Teir hava ikki vitað, hvar teir hava havt teirra lið. Onkra ferðina hevur KÍ spælt væl á útivølli, og aðrar ferðir hevur tað gingið av skriðuni.

Hóskvøldið í næstu viku fer KÍ at hava heimadyst á grasvøllinum á Svangaskarði. Í Molde taptu teir 2–0, men leikliga avrikið var góðkent. Við tí í huga eru vónirnar kanska hampuligar í morgin. Sammett við liðið, sum spældi í Molde, er neyðugt at gera eina broyting. Miðverjin Ovi Nysted, sum í hesum døgum er í Hollandi við KÍ kvinnunum, er leikbannaður. Tað kann hugsast, at Jan Andreasen, sum tvær tær síðstu ferðirnar hevur verið vongverji í høgru, fer í miðverjuna, at Harley Bertholdsen fer úr vinstra og á høgra vongverja, og at Símun Joensen verður vongverji í vinstru.

Tveir KÍ spælarar hava í vikuni verið burtur frá venjing. Men hvørki Atli Danielsen, sum var á beinkinum alla tíðina, ella Hjalgrím Elttør, sum spældi síðsta stóra hálva tíman, munnu kenna serliga møði frá landsdystinum.

### Fróði við aftur

Fróði Benjaminsen var leikbannaður í landsdystinum mikukvøldið. Hann var eisini leikbannaður, tá ið B68 vann ímóti B36 í Gundadali. Nú er hann tøkur aftur, og tað kemur sjálvandi væl við. John Heri Dam, sum hevur staðið seg rættuliga væl seinastu ferðirnar, er farin niður at ganga í skúla, men hann er longu komin heim at hjálpa til í morgin.

Jann Ingi Petersen eigur at kenna nógva møði frá landsdystinum, meðan Hans Fróði Hansen var á beinkinum alla tíðina. Sunnukvøldið spældi B68 venjingardyst á grasinum ímóti Skála, sum vann 3–2. Úrslitið er merkisvert, men toftamenn, sum restaðu nakrar av stuðulsspælarunum, siga seg ikki ganga so høgt upp í tað. Hans Fróði Hansen skoraði annað málið, og Óli Olsen, sum er ein av fleiri evnaríkum unglingum hjá B68, skoraði hitt.

B68 er næstfremst, og teir miðja eftir at sleppa upp í part í altjóða fótbólti næsta kappingarár. Teir meta allar dystirnar í síðsta triðinginum av kappingarárinum at vera rættuliga truplar, so tað skal stríðast fyri í fyrsta lagi at varðveita annað plássið.

VB-NSÍ:

# Vágbingar togast uppeftir

*Runavíkingar vóna uttan iva, at teir nú hava funnið leikaran, sum kann avgera tøttu dystirnar, so mongu javnleikirnir kunnu broytast til sigrar*



**Verður talan um trý stig móti NSÍ, er VB at kalla úr vandanum, sum hevur hótt liðið alt árið**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Vágbingar hava avgjørt talst millum tey, sum í minstan mun hava livað upp til vónirnar, sum vórðu settar teimum undan árinum.

Gaman í vóru boðini, at eitt nýtt lið skuldi spælast saman, men fyrru kappingarhálvu tóktist hetta taka væl meira av tíð, enn gott er.

Leingi var liðið á næst aftasta sessinum, men seinastu umførini er vend komin í. Ikki minst mundi útisigurin á FS Vágum koma væl við, og nú eru vágbingar so spakuliga farnir at líta longur uppeftir á talvuna.

Her er NSÍ eitt av liðunum, sum veruliga tykist hava fingið fótin fastan í oddinum, og tí er einki at ivast í, at talan verður um trupla uppgávu hjá VB. Liðið er tó væl mannað. Eingi leikbann ella skaðar gera um seg, og tí stendur Predrag Zivkovic í teirri hugaligu støðu, at hann ivaleyst noyðist at seta góðar leikarar á beinkin.

Tað noyðist Jógvan Martin Olsen helst eisini. Runavíkingar eru nevnliga eisini fullmannaðir, nú teir gera seg til at taka eitt fet upp móti heiðursmerkjunum. Seinast var Jónstein Petersen leikbannaður, men hann er tøkur aftur, og eftir spælið, sum hann sýndi í UEFA-Cup dystinum móti Lyn er einki at ivast í, at hann er ein styrkur í framrættaða spælinum.

Tað er Karsten From uttan iva eisini. Danski álopsmaðurin fekk ikki verið við móti GÍ, tá tað gekk heldur striltið at flutt leikloyvið teir 65 kilometrarnar úr Havn til Runavíkar. Hetta er nú komið upp á pláss, og einki er at ivast í, at tað júst er einum vandamiklum álopsmanni, sum NSÍ hevur sóknast eftir í ár. Bæði Helgi og Sonni L. Petersen hava verið raskir, og verið viðvirkandi til at skapt nógvar møguleikar, men liðnum hevur restað leikaran, sum hevur kunna avgjørt tættar uppgerðir.

Tað vóna runavíkingarnir, at teir nú hava fingið, og lítið er at ivast í, at uppgerðin á Eiðinum verður av tí tættara slagnum, so megnar From at sýna máltevið longu í fyrsta dystinum, kann væl vera, at íløgan fer at geva eitt munagott avkast av sær.



*Í Miðvági endaði við javnleiki fyrr í ár, tá EB/Streymur vitjaði, men tað úrslitið kann hvørgin parturin vera rættiliga nøgdur um sunnudagin*

EB/Streymur-FS Vágar:

# Sperdir vágamenn vitja

**EB/Streymur hevur staðið seg væl á heimavøllinum, og nú tykjast tær medda upp um miðjuna á talvuni**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

EB/Streymur hevur í nógvar mátar verið fríski íblásturin í landskappingini hetta kappingarárið. Í mun til undanfarin ár tykist liðið hava førkað seg heilt burtur úr bólkinum av liðum, sum stríðast undan niðurflytingini, og eitt nú hava dupultsigrarnir á B36 víst, at liðið avgjørt eisini kann taka tey »stóru« á bóli.

Tí er einki at ivast í, at felagsliði eru favorittar á Eiði sunnudagin, tá FS Vágar koma á vitjan.

Og líkt er eisini til, at EB/Streymur hevur møguleika at stilla við sterkastu manning sunnudagin. Størsta ivamálið tykist vera Gunnar á Steig í málinum, sum hevur nakað av trupulleikum við øðrum arminum, men roknað verður við, at hann verður tøkur. Tað verða Magni á Lakjuni og Ronnie Samuelsen helst eisini, hóast teir hava havt nakað av skaðum at dragast við.

Hjá FS Vágum er nú av álvara farið at tátta í í niðurflytingarstríðnum. Mett varð annars undan kappingini, at liðið í ár var væl betri fyri, enn teir áður hava verið sum uppflytarar, men hóast gott spæl í stórum parti av kappingini, eru neyðugu stigini ikki fingin til høldar.

Seinnu umførini hevur hetta eisini ávirkað spælið hjá liðnum, og til sunnudagin bøtir tað neyvan um, at Bjarni Prior og Vladimir Osipovs eru leikbannaðir. Eisini valdar stórur ivi um, hvørt Kim Poulsen er førur fyri at spæla, meðan tað hinvegin verður roknað við, at Jens Erik Rasmussen verður tøkur, hóast hann hevur havt trupulleikar.

Og eftir tapið fyri VB seinast er einki at ivast í, at vágamenn eru svangir eftir stigum. Í løtuni eru fýra stig til áttanda plássið, og tí er mest sum alneyðugt við stigum her og nú.

Heimamenninir vilja tó eisini tosa við um hetta. EB/Streymur er í løtuni á sætta plássinum, og tó at hetta ikki kann betrast hetta vikuskiftið, so kann ein sigur føra liðið heilt nær sessunum, sum bera europeiska luttøku við sær, og tað vóru tað neyvan mong, sum høvdu roknað við undan árinum.